## Cruise til Norðpólin

Norska reiðaríið Hurtigruten fer nú at leggja seg eftir at skipa fyri sokallaðum cruise-ferðum til Norðpólin. Í fjør kom Grønland í ferðaætlanina hjá reiðarínum, og Olav Fjell, forstjóri, væntar, at áhugi verður eisini fyri Norðpólinum sum ferðamáli. Tað nýggjasta skipið hjá reiðarínum, "Fram", er serbygt til at sigla í ísi og siglir í løtuni við Antarktis. Olav Fjell sigur, at Hurtigruten fer at leggja stóran dent á at ávirka umhvørvið í póløkinum sum minst.



## Óalmenna CIA-kanning

Velur grønlendska heimastýrið at skipa fyri sínari egnu kanning fyri at fáa greiði á møguligum CIA-fangaflutningi í grønlendskum loftrúmi og á grønlendskum flogvallum, eigur heimastýrið at lata ein serfrøðingabólk gera eina óalmenna kanning. Tað heldur danski søgufrøðingurin Nikolaj Petersen.. Hann sigur við KNR, at ein tílíkur bólkur kann neyvan vænta sær almenna hjálp, men hinvegin kann hann sjálvur kann øll viðkomandi skjøl.

# SHEFA2



*- Mítt boð er, at tendensurin í Føroyum verður hin sami, sum vit síggja aðrastaðni – at tú fert at fáa meira fyri sama pening, og soleiðis verður breiðbandið lutfalsliga bíligari, sigur Kristian Davidsen, samtaksstjóri í Føroya Tele*

Kristian vísir á, at tað er týdningarmikið fyri Føroya Tele at kunna veita tænastur við høgari dygd.

- Kundarnir krevja breiðband við høgari ferð og óavmarkaðari nýtslu, og krøvini til framtíðartænastur fara eisini at hava við sær tørv á hægri fjarskiftisorku. SHEFA2-kaðalin fer saman við FARICE at geva Føroyum trygt fjarskifti úteftir og at kalla óavmarkaða fjarskiftisor-ku mótvegis umheiminum.

Samtaksstjórin sigur, at nýggja sambandið nøktar fjarskiftistørvin hjá føroyingum mótvegis umheiminum nógv ár frameftir, og tað lyftir eisini fjarskiftissambandið hjá Hetlandi og Orknoyggjum við umheimin upp á eitt nógv hægri støði.

### Stór útbreiðsla

- Tað er kostnaðarmikið at útbyggja og

dagføra netið í Føroyum, og tað eru vit øll sum brúkarar, ið skulu rinda íløguna aftur. Tað ber tískil illa til at sammeta okkara prísir beinleiðis við prísirnar á øðrum størri marknaðum, har tað eru fleiri um at gjalda gildið, og har tað er lættari at leggja infrastruktur og aðra útgerð, sum krevst fyri at koyra breiðbandið. Men eg haldi, at tað er flott, at okkara fjarskotnar oyggjar hava eitt so gott breiðband, sigur Kristian.

Hann vísir á, at FT Net eftir einans fýra árum hevur megnað at givið øllum føroyingum møguleikan fyri breiðbandi, og longu nú hava 27% av øllum húskjum í Føroyum fingið sær breiðbandshald.

- Føroyar teljast soleiðis millum tey lond, sum hava hægstu breiðbandsútbreiðslu sammett við íbúgvaratalið, sigur Kristian Davidsen, samtaksstjóri í Føroya Tele.

Høganes:

# Fyrstu grundøkini seljast

**P/F Skyn hevur nú sent út brøv til fólk, sum hava søkt um byggiøki í Nes kommunu. Skyn skal nevniliga taka sær av søluni av hesum grundøkjum fyri kommununa**



*Fyrsta byggistig fevnir um økið, sum sæst innanfyri rundingin á myndini*

*Mynd: Nes kommuna*

HÚSABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nes kommuna hevur gjørt eina útstykkingarætlan undir Høganesi, sum fevnir um tilsamans 98 grundøkir til sethús. Í fyrsta umfari verða 29 grundøkir boðin út, og hesi eru millum 335 og 650 fermetrar til støðdar.

Fyrsta byggistig í ætlanini fevnir eisini um fýra íbúðarblokkar.

At taka sær av sølu um umsiting av sølu av hesum grundøkjum hevur kommunan gjørt avtalu við húsameklarafelagið, P/F Skyn.

- Grundøkini verða í fyrsta umfari boðin út til tey, sum eru uppskrivaði til grundøki hjá Nes kommunu. Gingið verður eftir listanum í teirri raðfylgju, sum fólk hava skrivað seg á listan, sigur Skyn, sum nú hevur sent út tilboðið til fólk, ið hava søkt Nes kommunu um grundøki.

### Alment útboð

Felagið sigur, at um ikki øll grundøkini, sum eru við í hesi ætlan, verða seld, verða tey, ið tá eru eftir, lýst til sølu alment.

Tey bíligastu grundøkini í Høganesætlanini (335 fermetrar) verða seld fyri 260.000 krónur, og tey dýrastu (650 fermetrar) verða seld fyri 460.000 krónur.

Á kunnandi fundi um ætlanina á Runavíkar Sjómansheimi í heyst, fingu fólk at vita, at uppi í prísinum fyri grundøkið er eisini bilhús, sum verður felags í byggiætlanini.

Tey, sum standa á lista hjá Nes kommunu um grundøki og hava fingið tilboðið hjá P/F Skyn sendandi, skulu lata frætta innan 4 vikur.

Saman við tilboðnum hevur Skyn eisini sent fólki kunning um ætlanina, sum eitt nú lýsir, hvørjir servituttir og reglur annars eru tengdar at byggingini undir Høganesi.

Meira kann lesast um Høganesætlanina á www.nes.fo.

# Úr jetflogfari - og aftur á hestabak



OLJA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

"Pápi mín reið kamel, eg koyrdi bil, sonur mín flýgur eitt jetflogfar… men sonur hansara kemur aftur at ríða á eini kamel…"

Soleiðis ljóðar eitt nútímans arabiskt orðatak, sum staðfestir, at velduga oljuframleiðslan í heiminum ikki kemur at vara í allar ævir.

Búskaparligur aktivitetur er neyvt tengdur at atgongdini til bíliga orku, og í dag stava 80% av orkuni, sum verður brúkt kring um heimin, frá lívrunnum evnum, olju, gassi og koli. Einsamøll stendur olja fyri 34% av heimsins orkunýtslu, og meira enn 95% av hesum fara til flutningstól. Ein varandi minking av oljuframleiðsluni fer tí at fáa álvarsligar avleiðingar fyri heimsbúskapin.

Amerikanski jarðfrøðingurin, M. King Hubbert, segði longu í 1956, at amerikanska oljuframleiðslan fór at náa hæddini onkustaðni millum 1965 og 1970, og hetta hendi júst í 1970.

Í 1974 segði amerikumaðurin, at heimsins oljuframleiðsla fór at náa hæddini í 1995. Hesaferð mistók hann seg – og tó. Tað eru viðurskifti, sum siga okkum, at heimsins oljuframleiðsla fyribils náddi hæddini í desember 2005, tí síðan tá hevur kurvan yvir framleiðslunøgd verið "fløt", hóast prísirnir á olju eru sjeyfaldaðir síðan ár 2003.

20% av samlaðu oljuframleiðsluni koma úr 14 veldugum oljuøkjum. Tey størstu eru Ghawar í Saudi Arabiu, Burgan í Kuwait, Cantarell í Meksiko og Daquing í Kina. Av hesum er tað bert Ghawar sum ikki er komið í hæddina – ikki heilt.

Framleiðslan í Ghawar er meira enn 5 miljónir føt um døgnið, sum er meira enn helmingurin av allari oljuframleiðsluni í Saudi Arabiu.

Norska oljuframleiðslan, sum náddi hæddina í 2001, hevur eina árliga afturgongd upp á 7%.